Jørn Astrup Hansen, Sjóvinnubankin:

Vit stuðla í tann mun, vit kunnu



Men vit mugu ansa eftir at hava javnvág millum innlán og útlán. Tí eru treytirnar fyri at fáa lán harðari, enn tær hava verið. Men hatta sum Haldur Vang sigur, kann kortini ikki vera rætt. Har má vera onkur misskiljing, sigur stjórin í Sjóvinnubankanum í sambandi við tað, Haldur Vang á Toftum førdi fram í Sosialinum leygardagin.

Nakra misskiljing er talan kortini ikki um!

Haldor Vang á Toftum setti í Sosialinum leygardagin álvarsamar ákærur fram ímóti bankunum:

»Hóast nógvar hundrað milliónir verða sprændar inn í bankarnar, kemur nærum eingin króna út í nakað arbeiðsplass«, segði hann m.a.

Haldor hevur sjálvur saman við øðrum arbeitt við at leggja lunnar undir eitt virki, ið serliga skal arbeiða við góðsking av flatfiski - P/f Turkihúsið á Oyrunum. Fiskasølan hevur viðmælt ætlanunum, og heldur tað vera skilagott at savna flatfiskin til viðgerðar á einum plássi.

Men tað hevur verið ógjørligt at fingið fígging.

»Frá bankunum fáa vit tað svar, at skulu vit fáa ein kassakreditt upp á einar 600.000 krónur, so skulu vit pantast fyri knappar seks milliónir krónur«, segði Haldor í leygardagsblaðnum.

Treytirnar frá bankanum vóru sambært Haldur nevniliga, at umframt at bankin skuldi hava 1. veðrætt (eina million) í bygninginum, skuldi hvør av teimum sjey eigarunum hefta fyri 700.000 krónur.

Tað var Føroya Banki, sum setti P/F Turkihúsinum á Oyrunum hesar treytir.

Men ákæran um at bankarnir ikki vilja gera sítt til at fáa hjólini aftur at mæla, hevur eisini verið vend móti Sjóvinnubankanum.

Vit hava tí spurt Jørn Astrup Hansen, sjóvinnubankastjóra, hvat hann sigur til hetta mál.

Kann ikki vera rætt

- Fyrst vil eg siga, at eg haldi ikki hatta kann vera rætt, sum Haldur Vang førir fram, sigur Astrup.

- At at banki krevur garanti uppá knappar seks milliónir áðrenn hann er til reiðar at læna 600.000 krónur út, kann ikki vera rætt, heldur hann.

- Tað er rætt at tað er vorðið truplari at fáa fígging, men hasum sum Haldur Vang sigur, trúgvi eg ikki. So harðar treytir kann ongin banki seta. Har má vera onkur misskiljing, sigur hann.

Vanta likviditet

Tað hevur verið ført fram frá fleiri síðum í seinastuni, at bankarnir vísa ov lítið samfelagssinni. At tit eru ov trekir at láta tær stóru upphæddirnar, tit hava fingið, fara út aftur til vinnuskapandi endamál.

- Tað er ikki rætt! sigur Jørn Astrup.

- Vit eru sjálvsagt til reiðar at stuðla sunnum til-tøkum. Trupulleikin er, at vit ikki hava nógvan pen-ing at arbeiða við.

Jørn Astrup vísir á, at støðan í føroysku bankunum leingi var tann, at útlánini vóru munandi størri enn innlánini. Tí er nógv sum bendir á, at tað áður hevur verið alt ov lætt at fingið fígging, heldur hann.

- Men nú mugu vit leggja okkum eftir at royna at fáa javnvág millum innlán og útlán. Og tað merkir sjálvandi, at tað verður truplari at fáa lán.

Ábyrgdin má býtast

Men at tað er so trupult sum Haldur Vang førir fram, er kortini ikki rætt, leggur hann aftur at.

- Vit eru til reiðar at stuðla í tann mun, innlánini geva okkum møguleikar til tess. Vit eru eisini til reiðar at átaka okkum ein part av fíggjarligu ábyrgdini - men vit eru ikki til reiðar at standa við endan einsamallir.

Vendu sær til Sjóvinnubankan

At tað, Haldur Vang førir fram skal skal vera orsakað av eini misskiljing, er ikki rætt. Sosialurin hevur fingið avrit av svarinum, teir sjey mennninir fingu frá Føroya Banka, og vit kunnu vátta, at hesar vóru treytirnar.

At fara undir nakað við hesum fortreytum bar sjálvsagt ikki til. Eftir at svarið var komið frá Føroya Banka vendu teir sær tí til Sjóvinnubankan við einum fyrispurningi.

Og haðani var svarið, at kom nøkur umsókn, fóru lánitreytirnar valla at vera aðrar enn tær, Føroya Banki hevði sett.

Tískil varð ongin umsókn send Sjóvinnubankanum.

s-s-

Vit tosa í morgin við Tage Benjaminsen, stjóra í Føroya Banka, um hetta mál.



STATENS PRÆMIEOBLIGATIONSLÅN 1969/94

Brune obligationer med serienumre 1-1000 og løbenumre 4001-5000 incl.

48. 'række juli 1993

Følgende større præmier er udtrukket

Serie	løbe nr.	Serie	løbe nr.	Serie	løbe nr.	Serie	løbe nr.	Serie	løbe nr.	Serie	løbe nr.
400.000 kr.		156	4363	484	4275	34	4815	351	4356	675	4222
488	4018	488	4328	587	4773	45	4610	354	4974	684	4137
		513	4459	589	4129	48	4723	358	4489	694	4904
200.000 kr.		634	4748	599	4667	77	4886	359	4071	699	4423
165	4534	835	4999	644	4937	82	4919	385	4875	701	4273
		951	4586	647	4082	94	4513	399	4157	766	4240
				718	4323	120	4735	403	4893	816	4790
100.000 kr.		10.000 kr.		791	4059	144	4114	411	4185	818	4785
524	4122	71	4901	876	4982	144	4883	418	4101	828	4907
650	4215	120	4666	895	4188	162	4657	427	4877	833	4170
		129	4211	903	4547	198	4413	428	4923	839	4331
50.000 kr.		193	4040	932	4127	199	4737	449	4254	840	4370
224	4530	220	4584	934	4932	204	4461	519	4389	841	4006
368	4050	234	4666	953	4707	216	4823	587	4224	865	4968
580	4621	302	4213			289	4781	588	4265	907	4065
		350	4252	5.000 kr.		297	4429	636	4519	930	4589
25.000 kr.		364	4049	14	4390	312	4484	643	4812	931	4442
39	4690	429	4318	14	4570	346	4074	647	4238	960	4724
100	4178	451	4845	27	4927	350	4824	671	4880	999	4589

Den officielle trækningsliste med samtlige 5800 præmier samt numrene på endnu ikke hævede præmier fra de seneste 5 trækninger kan købes for 3,50 kr. i bladudsalgene. Trækningslisten vil ligge til eftersyn på alle posthuse. Præmieudbetalingen finder sted i Danmarks Nationalbank og udvalgte posthuse fra d. 7. juli d.å. Trækningslister kan leveres på databærende medier ved henvendelse til DATA-SATS informatik A/S (telefon 42 52 21 00).

Kongeriget Danmarks Hypotekbank og Finansforvaltning

Landgraven 4, 1301 København K. Telefon: 33 92 80 00.